## Sum borgarakríggj

Stríðið millum myndugleikarnar og rúsevnaharkaliðini í Meksiko líkist meiri og meiri einum borgarakríggi. Tað er als ikki óvanligt, at tíggjutals fólk verða myrd ella fella í skotbardøgum um dagin, og tað er heldur ikki óvanligt at síggja høvuðleys lík í gøtunum. Rúsevnaharkaliðini eru púra eirindaleys. Tey royna at keypa sær stuðul frá løgreglumonnum og embætismonnum, og teir, sum siga nei, verða stutt sagt myrdir. Í summum førum verða næstringarnir eisini tiknir av døgum, skrivar AP.



## ES selir útgerð til píning

Hóast ES hevur staðfest ST-bannið ímóti øllum handli við útgerð, sum er ætlað at pína fólk við, eru tað framvegis nøkur av limalondunum, sum selja tílíka útgerð. Tað skrivar Amnesty International í einari nýggjari frágreiðing. Sagt verður, at hóast ES staðfesti ST-bannið í 2006, hava Spania, Kekkia, Italia og Týskland loyvt fyritøkum at útflyta útgerð, sum sambært ST-reglunum er ólóglig. Ein talsmaður fyri Amnesty International sigur, at ES hevur staðfest ST-bannið, men at nøkur lond hava ikki tett hol í lógini, sum gera tað møguligt hjá fyritøkum at selja útgerð til píning.

# Næstan bara kvinnur møttu

**Fleiri kvinnur enn vanligt sótu á áhoyraraplássinum, tá ið tingi í morgun fór undir at viðgera tey fýra uppskotini um at broyta valskipanina. Tað skaðar ikki at møta her, og vit noyðast til at gera eitt størri arbeiði fyri at fáa fleiri kvinnur valdar, segði ein av áhoyrarunum, Helena Fríðheim**



*Nakrar kvinnur møttu á tingfundinum, sum byrjaði fyrrapartin, at hoyra orðaskiftið um valskipanina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

VALSKIPAN

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Longu áðrenn tingfundurin í dag byrjaði klokkan 11, vóru nakrar kvinnur komnar í løgtingið at lýða á, meðan tingið viðgjørdi uppskotini um at fara frá verandi skipan við einum valdømi, hava fólkaatkvøðu ella seta eina nevn.

Summi høvdu tó vænta fleiri kvinnur sum áhoyrarar, tí seinastu tíðina hava fleiri kvinnurfelagsskapir ávara ímóti at fara aftur til at hava fleiri valdømi, og allar kvinnurnar, sum sita í løgtinginum, eru samdar um, at best er við einum valdømi.

Á áhoyrarastólunum sótu 10-12 kvinnur við nøkrum børnum og so onkur hendinga maður.

- Hetta er ein øgiligur kvinnuáhugi, helt onkur politikari skemtiliga fyri.

Onkir nýttu høvi at fara at heila upp á kvinnur á áhoyrarastólunum.

Beinanvegin, sum fundurin varð settur, høvdu 24 tingfólk teknað seg á listan fyri at fáa orðið. Tað er ikki óvanligt, tá ið nógv fólk lýða á, um enn málið er stórt ella smátt.

Orðaskiftið fór í gongd, og har varð sagt ymsikt meira ella minni viðkomandi um sjálvt málið og um ymist annað.

Meðan politikararnir fóru upp á røðarapallin kropp á kroppi, skiftu vit orð við eina kvinnu á áhoyraraplássinum.

### Nú má tað verða

- Tað er upp á tíðina, at vit fáa fleiri kvinnur valdar, og tað hevur ongantíð verið meira neyðugt enn nú at fara til verka. Men tað krevur eitt stórt arbeiði. Hvussu skulu vit kunnu marknaðarføra hetta landið við so lítlari kvinnuumboðan. Vit kunnu sammetast við lond í triðja heiminum, og tað ber ikki til longur, heldur Helena Fríðheim.

Hon heldur tað hjálpa, tí ið kvinnur møta upp á einum tingfundi bara fyri at gera vart við, at tær eru til. Tað skaðar í hvussu er ikki, sigur Helena Fríðheim.

Hon hevur fleiri ferðir væntað, at nú fór tað at verða, at fleiri kvinnur fóru at verða valdar, men hvørja ferð hevur hon verið vónsvikin, til dømis aftan á kvinnuráðstevnur.

- Men vit eru upp móti sterkari kreftum, sum arbeiða ímóti, at kvinnur verða valdar, sigur Helena Fríðheim, sum heldur tað vera alt ov tíðliga at fara frá verandi valskipan.

# Skálafossur góðtók bótina

**Vestmannatrolarin Skálafossur slapp við 40.000 krónum í bót fyri at hava fiskað við ov smáum meskum**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár boðaði Fiskiveiðieftirlitið politinum frá, at Tjaldrið hevði tikið Vestmannatrolaran Skálafoss á Skeivabanka.

Fólk av Tjaldrinum høvdu verið umborð og kundu staðfesta, at meskarnar í trolinum vóru ov smáar. Markið er 145 mm, men meskarnar á trolinum hjá Skálafossi vóri 141 og 142 mm.

Tjaldrið fór til Havnar við Skálafossi, sum longu týskvøldið fekk eitt sektaruppskot upp á 40.000 krónur. Tað góðtók spiparin, og reiðaríi veitti trygd fyri upphæddini.

Túrurin hjá Skálafossi var um at vera liðugur, tá ið hann var tikin.




*Tá í Skálafossur kom inn týskvøldið, stóð politiið á bryggjuni, og trolið kom í land*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*